# KKRROOSSSSOORRÐÐ

| RISIKERER MAN NÅR MAN HAR ØJNE I NAKKEN / SAND | DANSK Ø | TID | DYR | | MÅL | NAVN | HØRT | DRIK | DRENG | HVID SORT | 48 | SLÅR | TRÆ | NÆRMET SIG JORDEN | 48 SLEMT | LIRE | RETNING | ROMERTAL | PIGE SOM KOM SOVENDE TIL SIN BERØMMELSE / SVULME | VARME |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| BESKYTTELSE | | | | | INSTRUMENT / DYR | | | | | | GENE FORLIGES | | | | | | | INSTRUMENT / KALKULE | | |
| LEDT | | | | | | MINIØGLE / LYSNER | | | | | | | VIRKSOMHED / KLÆG | | | | | | | |
| TAL | | | | RYTTERSOLDAT / NUL | | | | | STARTE | | | | | | | | OMRÅDER / GRØNNE | | | |
| KORT | | OSTEELSKERE / SVAR | | | | | | PATENT / SPILLEREKVISIT | | | | | | | | | | | | DRÆNET |
| GENERENDE FREMMEDLEGEMER I SANSEORGANER? | | | | | | | | | DAMPER / LUFTART | | | | | PIZZA / STRENG | | | | | | |
| EGEN | LAND / GODE | | | | | | | | | | BINDEMIDDEL / MÆNGDE | | | | ALTSÅ / TORT | | | | | TILBAGE |
| | | BRYDE / KOBBERZINKLEGERING | | | | | LAND / HAR TRAVLT | | | | | PIGE / ØST | | | | MÆRKER / LOVLØSHED | | | | |
| HÅRD NEGL | | | | | RET / SLOGES | | | | | | | | LAND / LANGS | | | | | | | GOD |
| VÆSEN | | | | KÆLET | | GODS | | | | FUGL / UDRÅB | | | | VÆKSTEN / GUD | | | | | TILTALE / PIGE | |
| SKJUL | | | TAL / RØRE | | | | | | MAST / FUGL | | | | | | RET / KNEB | | | | | |
| | KRUMMER / VISNE | | | | | FUGL / DRIK | | | | | MÅL | | HELLIGE STEDORD | | | | | HYGGELIG / GODT | | |
| DEGENERERET | | | | | | | HVILEDE | | | FUGL | | | | | | | HVIS | | TAL | |
| EN DER MÅ DØJE MED VAND I MÆLKEN | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

# Spiritus-misbrúkið størsti trupulleikin hjá grønlendska landsráðnum

**Til várs, tá nýtt landsráð verður valt í Grønlandi, verður Elisabeth Johansen, sum hevur sitið í ráðnum sum einasta kvinna, ikki meira í landsráðnum. Hon sigur, at nú megu yngri kreftir sleppa í hennara stað.**

— Rúsdrekkamálið hevur verið tann torførasta uppgávan fyri grønlendska landsráðið í tey sekstan árini, eg havi verið limur, sigur Elisabeth. Øll hini málini hava vit á ein ella annan hátt loyst.

Rúsdrekkamálið heldur áfram frá fundi til næsta, men landsráðið má koma til eitt úrslit. Persónliga heldur Elisabeth ikki, at totalforboð er tað rætta, tí tað heldur hon vil gera tað, at byrjað verður aftur av nýggjum. »Vit hildu, at vit kundu fara um alkohol við máta. Hetta eydnaðist ikki, og eg beri ótta fyri, at enn er langt eftir á mál«.

Elisabeth Johansen er einasta kvinna í landsráðnum — og einasta mannfólk — sigur onkur, hon tekur seg nú burturúr landsráðnum, tá skeiðið er úti til várs aftur.

Elisabeth er kend fyri at siga sína hugsan um tey mál, hon hevur tikið sær av.

Tá grønlendska landsráðið vitjaði í Føroyum fyri fáum árum síðani, var Elisabeth við í ferðini.



**Elisabeth Johansen: — Eg havi sum einasta kvinna í landsráðnum ongantíð følt meg kúgaða**

## Ráfiskaprísir

Ráfiskanevndin, sum sett er eftir løgtingslóg nr. 21 frá 8. mai 1969, hevur á fundi 29. nov. 1974 ásett hesar minstuprísir fyri fyrstafloks blóðgaðan ráfisk kruvdur við høvdi frá vekt.

| | | kr. pr. kg |
|---|---|---|
| Toskur | yvir 70 cm 1A | 3,24 |
| — | — 70 cm 1B | 1,43 |
| — | 44—40 cm 1A | 1.95 |
| — | 44—70 cm 1B | 1.43 |
| — | 34—44 cm | 1,00 |
| Hýsa | yvir 40 cm 1A | 2,32 |
| — | — 40 cm 1B | 1,43 |
| Longa | | 1,95 |
| Blálonga | | ongan prís |
| Brosma | yvir 52 cm | 1,49 |
| Skøta | | 1,22 |
| Kongafiskur | | ongan prís |
| Upsi | yvir 75 cm | 1,10 |
| Hvítingur | yvir 31 cm | 1,00 |
| Havtaska | yvir 3 kg | 1,46 |
| Kalvi | yvir 4 kg | 6,21 |
| Tunga | yvir 300 gr. | 2,30 |
| Reyðsprøka | yvir 300 gr. | 2,13 |
| Skrubba | yvir 400 gr. | ongan prís |
| Steinbítur | | 1,04 |

Hesir prísir eru galdandi frá og við 30. nov. 1974, sum omanfyri tilskilað á hesum plássum:

Klaksvík, Hvannasund, Norðdepli, Leirvík, Fuglafirði, Eiði, Gøtu, Skálafirði, Nólsoy, Tórshavn, Vestmanna, Miðvági, Sørvági, Tvøroyri og Vági.

Fyri tey avreiðingarpláss, sum eru ikki nevnd her, verður prísurin hin sami, sum í omanfyri nevndu plássum við frádrátti av flutningskostnaði til og frá avskipingarhavn.

Tórshavn, 30. november 1974

**Prísásetingarnevndin á ráfiski**